


ólukkudýrið kókar skógvin, setir seg at eta, og sanniliga sýgur burtur úr hvørjum nagla. Man Chaplin hava sæð føroyingar eta grunningshøvd?

Segði eg, at tað var keðiligt at siga, hví skemt var skemt? At onki var so keðiligt? Tað er tí, at onki er so álvarsligt sum skemt kann vera.

Nógvir rithøvundar hava roynt at skriva um skemt og, hvat tað er. Tá vit nú hava skemtið hjá Óla Petersen hjá okkum, og tað snýr seg um hansara teknilist, og hansara álvarsskemt, so er hóskandi at taka til gamla Sokrates. Hann skal hava sagt, at tann sum í síni framferð gloymir innskriftina í Delfi "Kenn teg sjálvan!" og kanska hevur hug at yvirmeta sítt egna virði, hann elvir skemt at sær.

Mær tykir, at hesa síðuna við lívinum, er tað at Óli Petersen dugir at taka fram í sínum skemti. Hetta at snara verdigheitini á eitt sindur hjá einum og øðrum, ið kann hava gloymt innskriftina í Delfi. Politikara, ella presti ella vinnulívsmanni ella agitatori av hesum og hasum slag. Tá er Óli góður. Ja, enntá fáa okkurt skemt burtur úr nøkrum so keðiligumÅ sum granskarum, tað er gott gjørt!

Men lat meg venda aftur til Jákup á Møn. Kann tað vera so, at Jákup ikki er nakar sambiðil hjá yrkjaranum, men hansara keipumynd af føroyinginum, ið vil koma sær fram, men við so lítlum hepni. Tá kann eg síggja skemtið í táttinum, tí mær dámar væl skemt um okkum føroyingar sjálvar. Eitt sindur av speispemi um ein sjálvan er gott. Eisini í fullveldistíðum. Tí skal eg siga hesa søguna, ið er vælkend summastaðni úti í heimi, og sum onkur fullveldisíspegil hevur skoytt ein enda uppí um okkum føroyingar. Søgan var nógv fortald tíðliga í hesi øldini, og sigist soleiðis:

Einaferð varð útskrivað ein altjóða kapping millum lond at skriva eina ritgerð um elefantar. Fleiri lond sendu inn, eisini úr Føroyum kom nakað. Um elefantar skal eg onki siga, men heitini á ritgerðunum eru so sermerktar fyri londini, tær komu úr. Franska ritgerðin kallaðist De lámour d'élefant (um kærleikslív fílanna). Úr Onglandi kom rit, ið stutt og greitt nevndist Elephants I have shot, og úr Amerika eitt verk við heitinum How to make bigger and better elepfants. Týska ritgerðin var stór, í 18 bindum, og hevði heitið Eine kurze Einführung in das Lebes des Elefantes. Sviar, ið eru kendir sum høvisk fók, sendu sítt rit inn við heitinum Hur man titulerar elefanter. Um hetta mundið var Finland um at gerast sjálvstøðug tjóð og gjørdu nógv fyri at festa sína óheftu støðu á altjóða leikpallinum. Finska ritgerðin kallaðist How to arrange international kongresses in Helsinki. Eisini Danmark var við og sendi inn eina kókibók um evnið: Elefant på hundrede måder. So var freistin úti, men tveir mánaðir seinni kom ein ritgerð úr Føroyum. Hon kundi ikki heilt teljast við, tí hon kom ov seint, men tá dómsnevndin fór at lesa, skiltist væl, hví hon kom so seint: Hetta var ein týðing av tí donsku ritgerðini!

Og nú man fimm og ein hálvur minuttur vera farin"

Óli P dagur á Argjum

Hetta er annars 10. árið á rað, at Óli Petersen hevur tekning á baksíðuni í Sosialinum.

Í hesum sambandi fer Sosialurin at skipa fyri „Óla P degi" í blaðhúsinum á Argjum fyrst í desember mánað. Har verða tiltøk av ymsum slag, eitt nú verður alt húsið ein gjøgnumgangandi framsýning við tekningunum hjá Óla hesi „fyrstu" 10 árini.

Tá kemur so eisini tann 10. bókini í røðini „Skemt" út..

Síðani Óli byrjaði við sínum blaðtekningum er rúgvan bara vaksin og vaksin. Ikki kann sigast annað enn, at maðurin hevur verið virkin. Samlaða talið á tekningum hesi 10 árini er umleið 1700. Og allar hesar tekningar ber til at ogna sær við at venda sær til Sosialin, sum hevur allar bøkurnar til sølu.

Blaðteknarin Óli Petersen við tekning av sær sjálvum á framsýning á Føroya Landsbókasavni. Hon er opin hesa vikuna.



Frá framsýningini á Landsbókasavninum um „Skemt".